## Spæla í Graz og í Guingamp

Nú er ásett, hvar útidystirnir hjá føroyska A-landsliðnum í fótbólti móti Eysturríki og Fraklandi verða spældir í ár. Í Eysturríki verður spælt á UPC Arena í Graz, og er tann dysturin 5. September. UPC Arena er heimavøllur hjá Sturm Graz og Grazer AK. Tann 10. oktober spæla Føroyar í Fraklandi, og verður tann dysturin í Guingamp, sum liggur í útnyrðingshorninum av Fraklandi, Bretagne, tætt við Ermasundsstrondina. Fýra dagar seinni spælir landsliðið á útivølli móti Rumenia.

## Menchov vann í Italia

Russiski Denis Menchov vann sunnudagin stóru súkklukappingina, Giro d'Italia. Á seinasta teininum, sum var ein einkultstartur, var tó um reppið, at tað gekk galið. Menchev reyk í vátu flísurnar á seinasta kilometrinum, men ein hjálpari var nærhendis, og so eydnaðist tað 31 ára gamla súkklaranum at vinna sín fyrsta sigur í stóru italsku kappingini. Undan hesum hevur Menchov tvær ferðir vunnið Vuelta a España.






*Hóast ein mann í minniluta í 85 minuttir, vunnu teir næstbestu hjá HB heimadystin ímóti Skála, og av tí at bæði FC Hoyvík og TB settu stig til leygardagin, er HB nú oddalið í 1. deild*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

# HB á næstbesta oddasessinum

**Tá hvørki FC Hoyvík ella TB fingu fult burtur úr sínum dystum, yvirhálaði HB tey og legði seg á odda í 1. deild**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Framvegis er ikki til at siga, hvussu tað fer at spæla av í næstbestu mansdeildini í fótbólti, tá hon eina ferð endar í heyst. Til tað eru avrikini alt ov óstøðug og eingin favorittur hómast í havsbrúnni.

Fremstu kandidatarnir í løtuni, FC Hoyvík og TB, høvdu møguleikan at styrkja um sína støðu í oddanum í 10. umfari leygardagin, men bæði snávaðu, tá hoyvíkingar taptu og tvørámenn bert fingu javnleik. Heldur ikki B71 slapp undan at seta stig til.

Hinvegin hevur VB/Sumba nú aftur fingið fatur í rætta endanum, eftir at liðið bert hevði fingið eitt stig síðstu trígggjar dystirnar, og tað kann verða so skjótt, at VB/Sumba er við heilt har frammi.

NSÍ og Víkingur, sum ikki kunnu flyta upp allíkavæl, liggja oman fyri niðurflytingarstrikuna, meðan Skála og serliga MB stríðast í botninum.

### Vunnu í minniluta

Dysturin í Gundadali var bara fimm minuttir gamal, tá Christian Restorff Mouritsen fekk reyða kortið fyri hevnissøku, og tí mátti HB spæla so at siga allan dystin við einum manni í minniluta. Hetta var tó ikki nóg mikið til at forða havnarfelagnum í at vinna dystin og oddasessin.

Steffan Frederiksberg gav annars unga Skála-liðnum góða byrjan, tá hann skoraði til 1-0, men í fyrra hálvleiki javnaði Rani Debes Christiansen við brotssparki, áðrenn hann í seinna hálvleiki staðfesti sigurin við einum góðum langskoti.

Rani kundi gjørt sigurin uppaftur tryggari, tá hann ímóti endanum aftur skjeyt brotsspark, men Eyðun Ryggshamar í Skála-málinum bjargaði. Ímóti endanum kundi Skála eisini komið afturíaftur, tí tvær ferðir stakk bólturin í stongina aftan fyri Marcin David…

### Oddaliðið fall

Leygardagin hevði oddaliðið úr Hoyvík vitjan av teimum næstbestu hjá Víkingi, sum eina ferð fyrr hava vunnið á FC Hoyvík, og tað gjørdu teir aftur hesa ferð. Hetta eru teir einastu sigrar higartil hjá teimum ljósabláu.

Mitt í fyrra hálvleiki skoraði Per Gregersen til 1-0, og kundi Víkingur fara til hálvleiks við einari fult uppibornari leiðslu, tí liðið hevði verið klárt betri fyrstu 45 minuttirnar.

Eftir steðgin spenti FC Hoyvík seg út og vendi dystinum, men hóast greiða yvirvág í spæli og uppløgdum málmøguleikum, spurdist einki burturúr. Í staðin endaði eitt mótálop hjá Víkingi fimm minuttir fyri tíð við einum brotssparki, sum Bárður Hansen setti í kassan, og so var sigurin vísur.

### Dramatiskur endi

TB, sum ikki hevur verið partur av bestu mansdeildini síðani 2005, er eitt av feløgunum, ið livir í vónini um aftur at koma upp millum tey bestu. Men ikki gongst heilt eftir vild – og tað gjørdi tað heldur ikki leygardagin.

Í dystinum í Runavík ímóti NSÍ vóru tað vertirnir, sum høvdu teir heldur betru kjansirnar fyri steðgin, men sum seinni hálvleikur leið, økti TB trýstið. Tó kom ikki hol á fyrr enn í 89. minutti, tá Petur Mortensen legði TB á odda 1-0 eftir sending frá Joseph Bassene.

Nú skuldi alt verið avgjørt, men NSÍ kastaði í einari desperatari roynd alt fram, og í triðja minutti av yvirtíðini spurdist eitt brotsspark burturúr, sum Øssur Dalbúð kundi seta inn, so dysturin fekk ein dramatiskan enda og altso endaði við javnleiki 1-1.

### Jøvn miðjulið

B68 hevði vitjan á Svangaskarði av B71, men fyrsta hálva tíman vóru tað toftamenn, sum sótu á øllum. Áðrenn 10 minuttir vóru farnir, hevði umskúlaði miðverjin, Oddur Højgaard, sum nú er framherji, skorað til bæði 1-0 og 2-0.

Ikki fyrr enn síðsta korterið av fyrra hálvleiki raknaðu gestirnir við, og beint fyri hálvleik vísti Clayton Soares, at hann helst er ov góður til næstbestu deildina, tá hann minkaði um munin.

Tað var eisini hann, sum mitt í seinna hálvleiki javnaði fyri B71, sum nú hevði fingið fótin fyri seg og sat á tí mesta. Men hóast tað, so mundi javnleikurin vera eitt úrslit, ið samsvaraði væl við samanløgdu avrikini hjá liðunum.

### Kundu vunnið meira

VB/Sumba hevur ikki júst havt eydnuna við sær í síðstuni, men dysturin í Miðvági var ein lítil vend, tí har vann VB/Sumba ein sannførandi sigur á MB, sum framvegis bara hevur fingið tvey stig.

Hartmann Hansen legði VB/Sumba á odda tíðliga í fyrra hálvleiki, og tá hálvur tími var spældur, økti Palli Augustinussen til 2-0. 10 minuttir inn í seinna hálvleik minkaði Jón Poulsen um munin, men mótbrekkan var tung hjá MB, sum um sama fekk ein mann útvístan.

Gestirnir høvdu nógvar møguleikar og fingu eisini tvey mál kolldømd, umframt at bæði lið raktu træverkið, men tað var ikki fyrr enn í yvirtíðini, at Henning Joensen kundi tryggja VB/Sumba sigurin og trý týdningarmikil stig, so liðið aftur er í nánd av oddanum.

## Bestubitar úr 3. hálvleiki

**Niðanfyri eru nøkur av teimum mongu SMS'unum, sum vórðu send til 3. hálvleik hjá Rás2 mánadagin. Besta SMS'ið fær sendandi eitt gávukort upp á 500 kr. frá Bygma, og er hetta tað SMS'ið, sum stendur ovast í røðini**

»Argir havnamenn«

»Óli Olsen er ikki lika gòdur sum landkrabbi«

»Frensurin pissadi upp eftir rygginum à tikaranum...so er tad sagt«

»Uha uha, White Tigers i ferd vid at verda utruddadir i Frensalandi«

»Samkensluskriv. HB vit hava samkenslu vid tykkum. B68 gjørdi sama nr i Sarpugerdi Heilsan 1 VIKINGUR«

»Enn einaferd pràgvandi vikingur at teir eru betri enn if... Og enn einaferd helvadi ultras, red dragons av«

»Visti ikki at føstan var so long men frenrarnir klora og fýsa enn«

»Jògvan Martin hevur ikki bara broytt spæli stilin hjà Vikingi, men eisini hugburdin hjà teirra vidhaldsfòlki, tì nù eru tey farin at grenja um at mòtstøu lini spæla for hart.«

»Hilmar jan segdi at jàkup var seldur. Veit nakar hvar hann er farin..??..:-P«

»Man Havnin ikki hava skyldina av at KÌ tapir alla tíðina? :-)«

»Blàa bylgjan skoladi ùt ì avløbid. Medan vespurnar stungu vid byrjan og enda.«